# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Mia Davidsen, *Æðuvík*** andaðist á Landssjúkrahúsinum 7. apríl, 55 ára gomul. Farið verður úr kapellinum hósdagin kl. 16. Jarðarferðin verður úr heiminum fríggjadagin kl. 14 í Nes kirkjugarð. Tey, sum vilja minnast Miu kunnu lata jólabygdini í Æðuvík eina peningagávu. Konta í Norðoya sparikassa.

Kistan við Karl Kenning fer úr kapellinum á Suðuroyar sjúkrahúsi hósdagin klokkan 18. Jarðarferðin verður fríggjadagin klokkan 13 úr Tvøroyrar kirkju. Tey, ið vilja minnast Karl kunnu lata Tvøroyrar missiónshúsi eina peningagávu. Konta í Eik.

†

**Ruth Olsen**
fødd Isaksen

andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 6. apríl, 70 ára gomul.
Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum mikudagin kl. 17.30.
Jarðarferðin verður úr Ebenezer hósdagin kl. 13.30.

*Vegna tey avvarðandi*
**Jákup N. Olsen**

# 65 ár í hjúnabandi

**Í dag hósdagin 10. apríl eru 65 ár liðin, síðani Elly og Eivind Niclasen í Klaksvík giftust**



Eftir so langt lív saman sigur tað seg sjálvt, at tey bæði eru væl kendur partur av býarmyndini í Klaksvík.

Tey búgva framvegis í húsunum á Gerðareiði, sum tey høvdu latið byggjað og fluttu í, tá ið tey giftust í 1943.

Elly er ættað úr Norðurstovu í Gerðum. Hon er fødd 4. august í 1922 og er dóttur Karl, bónda, og Karolinu, sum var úr Trøllagili. Tey fingu átta børn: Johnhild, Óli, Lena (doyði sum smágenta), Elly, Trinilena, Karl Monrad, Hedvig og Mikkjal. Trinilena býr niðri, og øll hini búsettust í Klaksvík, har eftirkomararnir hjá teimum eru rættuliga nógvir. Eftir á lívi eru Elly, Trinilena, Hedvig og Mikkjal.

Eivind er ættaður úr Sørvági. Hann er føddur 16. juli í 1918. Foreldrini vóru Elisabeth og Óli Niclasen . Tey fingu níggju børn: Erik búsettist í Klaksvík, Karl á Tvøroyri, Nikolina í Vági, Lena í Søldafirði, Hjalmar, Jóhannus og Hans Dávid í Sørvági og Ove og Eivind í Klaksvík. Eivind er einsamallur eftir á lívi.

Elly og Eivind eiga trý børn: Karolina, Ólavur og Ragnar. Karolina og Ólavur búgva í Klaksvík, og Ragnar hevur verið trúboðari á Filipsoyggjunum og nú í Onglandi.

Eivind kom til Klaksvíkar fyrst undir krígnum. Hann helt til hjá beiggjanum Ova, sum hann trý ár seinni gjørdist granni hjá. Eivind tók motorpassaraprógv og skiparaprógv, og miðskeiðis í fimmti árunum tók hann longdina í Klaksvík.

Í 1947 keypti Eivind saman við beiggjanum Hans Dávidi og Guðleivi Thorsteinsson í Klaksvík útróðrarbátin Barðið. Seinni keypti Eivind partarnar hjá hinum báðum, og hann dreiv sjálvur bátin inntil seinnapartin av fimmti árunum. Í 1957 lótu Eivind og brøðurnir Hjalmar og Hannus línubátin Vesturvón byggja. Eivind var skipari fyrstu árini. Í seksti árunum var hann í fleiri ár stýrimaður á einum donskum sleipibáti, Sigyn, sum sigldi í Grønlandi. Í 1969 lótu Eivind, Hjalmar og Hannus fyrsta hekkutrolaran Vesturvón byggja. Fyri nøkrum árum síðan gavst Eivind við reiðaravirkseminum.

Bæði umborð á útróðrarbátinum, línuskipinum og trolaranum var hann tiltikin røkin og nýtti sítt góða hegni og sínar góðu arbeiðsgávur. Elly hevur, sum nógv tær flestu føroysku konurnar og mammurnar tá í tíðini, altíð verið heima og ansa manni, børnum og heiminum. Har hevur skinið av hvørjum spreki, gestablídni hevur verið stórt, og tey bæði hava verið tiltikin fyri góða urtagarðsrøkt.

Krúndiamantbrúdleypsdagurin verður hildin í bygdarhúsinum í kvøld.

**Dagurin**
**11. apríl. Leo**, deyður í 461. Pávin Leo I, nevndur tann Mikli. Hann talaði Artala húnakong frá at hertaka og ræna Róm. Navnið Leo merkir leyva.

# Kend listaverk í Smiðjuni

Fríggjadagin kl. 15 – 18 letur ein forvitnislig framsýning upp í Smiðjuni í Lítluvík við donsku listafólkunum Tove Damm og Bjørn Wandall.

Talan er um eina sølu-framsýning við listaverkum hjá føroyskum og donskum listafólkum sum t.d. Sámal Joensen Mikines, Ruth Smith, Hans Hansen, Kristin í Geil, Jógvan Waagstein, William Heinesen, Niels Bjerre, Jack Kampmann og Sven Havsteen Mikkelsen. Umframt málningar eru eisini onkur gomul sjaldsom, grindaknívar o.l.

Framsýningin verður annars opin leygardagin 12. og sunnudagin 13. apríl frá kl. 11 til 18.



# Hans Petur skúlastjóri á Strondum

Mentamálaráðið hevur sett Hans Petur Jacobsen í starv sum skúlastjóra í Stranda skúla frá 14. apríl 2008

Hans Petur Jacobsen hevur starvast sum lærari í fólkaskúlanum síðani 1. august 2002 og hevur nomið sær eftirútbúgving í alisfrøði, støddfrøði, ítrótti og innan trivnað. Hans Petur er upprunaliga maskinmeistari, men hevur seinni tikið HF- prógv og síðani læraraútbúgving.

Hans Petur hevur leiðsluroyndir frá smiðjuarbeiði, sum maskinmeistari og sum formaður í ítróttarfelag. Eisini hevur hann fyrisitingarligar royndir sum limur í bygdaráðnum í Sjóvar Kommunu og formaður í trivnaðarnevndini, har hann m. a. hevur sum uppgávu at seta starvsfólk í kommununi.



*Hans Petur Jacobsen er 43 ára gamal*